# Meira avskornar enn neyðugt

**Hóast tyrlan sum einki verður fylt nú um dagarnar á túrinum til Fugloy og Svínoy, ger hon ikki eykatúr, hóast nógv fólk standa eftir**

VERKFALLIÐ
*Turið Kjølbro*

Ringast fyri í verkfallinum eru smæstu útoyggjarnar, har fá fólk búgva. Sambært bygdaráðsformanninum í Fugloy, Zacharias Zachariasen í Hattarvík, hevur tyrlan gjørt færri túrar í oynna, enn hon eigur og plagar.

– Tað vísir seg, at størri áhugi er at flúgva til sunnaru oyggjarnar. Um hon setir ferðaætlanina til viks, skal eg ikki siga, men vit kunnu í øllum førum staðfesta, at fáir túrar hava verið hesar tríggjar vikurnar, meðan verkfall hevur verið. Veðrið kann vera ein orsøk, sigur Zacharias Zachariasen.

Hóast tyrlan sum einki verður fylt nú um dagarnar á túrinum til Fugloy og Svínoy, ger hon ikki eykatúr, hóast nógv fólk standa eftir.

– Tað verður hildið at vera at taka verkfalsrakt arbeiði upp, skilja vit á lagnum, men tað sum er meiri harmiligt er, at vit, sum búgva á útoyggj og sum eiga framíhjárætt til tyrluna, ikki sleppa upp í part sum vit eiga, sigur Zacharias Zachariasen.

Leigaður bátur er komin í oynna við fóðri til kríatýrini, og mánadagin í vikuni fóru fólk av oynni inn í Sund at keypa mat. Beint fyri verkfallið, fekk oyggin olju út.

– Eitt er at leiga bát á henda hátt, men vit eru so illa mannað, at tað í sjálvum sær er ein trupulleiki at fara við báti av oynni. Betri hevði tað verið um tyrlan kundi gjørt eykatúrar. Verkfall kemur altíð ringast við hjá okkum, sum búgva á útoyggj. Ikki fyrr enn flogvøllurin, vegir har í nánd og Oyragjógv verða stongd, hendir nakað í verkfallinum, sigur Zacharias Zachariasen.



*Leigaður bátur er komin í oynna við fóðri til kríatýrini, og mánadagin í vikuni fóru fólk av oynni inn í Sund at keypa mat*

# Ongin undirvísing í kunningartøkni í fólkaskúlanum

**Verður avtala um KT-økið í fólkaskúlanum ikki gjørd innan stutta tíð, noktar Føroya Lærarafelag limum sínum at arbeiða sum KT-vørðir frá komandi skúlaári**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*



*– Tað vísir seg hvørja ferð, at tað er Føroya Lærarafelag sum má ganga á odda fyri at fáa viðurskifti í rætt lag, uppgávur sum myndugleikarnir annars eiga, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag*

Enn ein blokada rakar føroyska fólkaskúlan. Orsøkin er, at ongin avtala er fingin í lag um KT-økið í fólkaskúlanum. Tískil noktar Føroya Lærarafelag limum sínum at arbeiða sum KT-vørðir frá komandi skúlaári.

Ábyrgdina av, at KT-økið í fólkaskúlanum ikki virkar nøktandi, eigur Mentamálastýrið. Hóast Føroya Lærarafelag fleiri ferðir hevur biðið um samráðingar um KT-økið í fólkaskúlanum, álit er skrivað og tilmæli er gjørt, er hetta ikki komið í lag enn.

KT-vørðarnir hava í nøkur ár arbeitt eftir eini fyribilsavtalu um røkt av KT.

– Hóast tørvurin er kannaður og staðfestur, er einki hent síðani, hóast myndugleikarnir hava havt fleiri umboð í arbeiðsbólkinum og Føroya Lærarafelag bara eitt. Vit høvdu veruliga roknað við, at eftir at niðurstøður eru gjørdar og tilmæli eisini, komu samráðingarnar stutt eftir, men hóast vit hava biðið um fund fleiri ferðir hetta skúlaárið, hava vit einki hoyrt, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Sum er fáa KT-vørðarnir eina lítla samsýning fyri røkt av teldum. Umframt vantar ein starvslýsing ella reglugerð fyri arbeiðið hjá KT-vørðunum. Hendan skuldi verið komin beint eftir at nýggja fólkaskúlalógin kom í gildi í 1998.

– Í sambandi við røkt av søvnum, sum stríð er um løtuni, hevur Fíggjarmálastýrið meldað út, at tey einki hava at gera við røktina. Fíggjarmálastýrið stúrir kanska fyri, at tey víðvíkjandi KT-økinum, hava undirskrivað nakað, sum hevur samband við røkt av søvnum. Har er ein teknisk síða og ein námsfrøðiliga síða, og Fíggjarmálastýrið metir seg bara hava ábyrgdina av teirri námsfrøðiligu. Teknisku síðuna eiga kommunurnar, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Til savnsrøktin er fingin í rætt lag, røkja lærarar ikki søvn, amboð og einki innkeyp av tilfari fer fram. Hetta merkir, at serliga kreativu lærugreinirnar í fólkaskúlanum eru nógv skerdar í løtuni og nógva staðni er eingin undirvísing. Spurd um tað ikki er óheppið enn eina ferð at niðurleggja øki innan fólkaskúlan, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, at felagið hevur víst góðan vilja.

– At økið ikki er fingið í rætt lag, er ikki okkara skyld. Tað vísir seg hvørja ferð, at tað er Føroya Lærarafelag sum má ganga á odda fyri at fáa niðurskifti í rætt lag, uppgávur sum myndugleikarnir annars eiga. Politikararnir hava kroyst eina lóg niður yvir okkum uttan at hava gjørt neyðugu fyrireikingarnar. Einasta vit kunnu gera fyri at fáa viðurskiftini í rætt lag, er at heita á myndugleikarnar, og tá ið tað ikki hjálpir, eru vit noydd at langa nevan í borðið.

So leingi sum KT-økið í fólkaskúlanum ikki er fingið í lag, er ongin grund til at seta í verk eina nýggja útbúgving av KT-vørðum, heldur Føroya Lærarafelag. Samstundis krevur felagið, at starvslýsingin fyri KT-vørðir í fólkaskúlanum verður góðkend og sett í verk.

# Nú skal demokratiið vísa sítt virði

**Politiska støðan í Føroyum í dag er góð, sigur Jógvan Sundstein, fyrverandi løgmaður. Løgmaður handlar fult í tráð við stýrisskipanarlógina, og nú fáa landsstýrismenninir ein veruligan møguleika at royna síni evni, og demokratiið at vísa sítt virði**

STÝRISSKIPAN
*Edvard Joensen*

Støðan, sum nú er íkomin á politiska pallinum, er góð fyri demokratiið hjá okkum, tí nú sleppur tað veruliga at vísa sítt virði, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður.

Jógvan Sundstein, ið sum politikari var við til at gera stýrisskipanarlógina, sigur, at við hesi nýggju støðuni fær lógin veruliga høvi til at standa sína roynd.

–Endamálið við lógini var millum annað at skilja millum løgting og landsstýri. Tí verður ikki tosað um samgongu, men um løgmann, í lógini. Løgmaður er tann, sum skipar landsstýri, eins og hann loysir tað úr starvi.

At loysa løgmann úr starvi eru tríggir hættir, vísir Jógvan Sundstein á. At hann sjálvur leggur frá sær. At hann fær avgjørdan politiskan meiriluta í móti sær, ella at hann doyr.

Tað ger so aftur, at í verandi støðu hevur løgmaður fullan rætt til at verða sitandi alt skeiðið, um hann vil tað. Tað er nevniliga ikki soleiðis, vísir Jógvan Sundstein á, at eitt løgtingsval av sær sjálvum loysir løgmann úr starvi.

Jógvan Sundstein dylur ikki fyri, at hann helt gomlu stýrisskipanina, sum kravdi meiriluta samgongu, vera vánaliga.

–Hendan skipanin, vit nú hava fingið, byggir á vanliga parlamentalismu, og kann væl loyva einum minnilutastýri, um tað skuldi verið.

Tað hevði í grundini ikki verið tað ringsta, sigur Jógvan Sundstein, tí so fingu landsstýrismenn veruliga møguleika at vísa síni evni við tingingum um tey mál, teir arbeiða við. Somuleiðis hevði andstøðan tá eisini sloppið upp í part, tá politiskar avgerðir skulu takast, sigur hann.

–Hendan støðan, vit í dag eru í, og sum er uppstaðin av nýggju stýrisskipanarlógini, kann veruliga menna ta politisku skipanina, heldur Jógvan Sundstein, fyrrveradi løgmaður.



*Politiska støðan í dag er góð fyri demokratiið, sigur Jógvan Sundstein, fyrrverandi løgmaður*









Leygardagin 11.05 hava vit opið frá kl. 10.00 til 15.00
Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi:

Upp til 15.000 kr. í avsláttri

| | | |
|---|---|---|
| Citroen Jumpy 1,9TD 8 fer andi<br>km. 28.200, árg. mars 2000<br>190.000,- | Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5h<br>km. 145.000, árg. mai 1992<br>52.000,- | Hyundai Accent 1,3 LS 5H<br>km. 65.000, árg. feb. 1999<br>75.000,- |
| Citroen Jumper Ch. v/last<br>árg. aug. 1998<br>Fyrr 150.000 139.000,- | Mitsubishi Lancer 5h<br>km. 124.000, árg. juni 1992<br>Fyrr 65.000 50.000,- | Mazda E2200 Vøruvognur<br>km. 91.500, árg. mars 1997<br>Fyrr 95.000 85.000,- |
| Citroen Xsara 1,9TD 5H<br>km. 83.000, árg. des. 1998<br>120.000,- | Fiay Tipo 5H<br>km. 109.000, árg. mai 1989<br>26.000,- | Peugeot 306 1,9D 4H<br>km. 150.000, árg. apr. 1995<br>80.000,- |
| Citroen Xsara 2,0 HDi Stc. 5H<br>km. 83.000, árg. juni 1999<br>140.000,- | Ford Escort 1,8D CLX 4 h<br>km. 187.000, árg. nov. 1995<br>Fyrr 52.000 45.000,- | Seat Cordoba 1,9SDi STC. 5h<br>km. 35.500, árg. aug. 1999<br>Fyrr 125.000 115.000,- |
| Mitsubishi L300 2,5D<br>km. 161.000, árg. juni 1994<br>Fyrr 85.000 70.000,- | Ford Sierra 2,0i CLX 4h<br>km. 110.000, árg. nov. 1991<br>45.000,- | Toyota Camry 2.2 GL<br>km. 143.000, árg. jan. 1993<br>80.000,- |

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo